# Eg eri Fótatraðkari

*Lag: Eg eri Jólamaðurin*

1.Eg eri Fótatraðkari
Á Oyrasundi staddur
Av og á tá blívi eg
fullur í býnum sæddur

*Niðurlag:*
*Hesin sangur er góður*
*helst tá ein er fróður*
*Hann kann vera um teg og meg*
*tá eingin stendur við róður*

2.Tá ið veitslu eg fari avstað
góðan botn eg leggi.
Ein góðan akvavitara
undir hvørjum veggi

3.Tá eg komi í húsið inn
har veitslan hon skal standa.
Slúki eg ein pakka gult gajol
fyri at fjala mín anda.

4.Vælkomstdrykkin taki eg
mungi eftir fleiri,
so títtur á vesi gangi eg
og snapsarnir verða fleiri

5.Fyri at fáa snaps sum mest
meðan vit sita og eta
brúki eg tann góða sið
millum avhaldsfólk meg seta

6.Tá ið matur etin er
á dansigólv øll rýma
tá siti eg og drekki øl
og hugsi um hví tey tíma

7.Sjuss og øl tað slúki eg
meðan hini dansa
tó fløskuni í ringinum
eg væl man eftir ansa

8.Eg plagi at sovna á miðari nátt
áðrenn hundavaktin er liðin
á tann hátt verði aldrin eg
til vaskikonu biðin.

***Speril hølk – Dansifelagið Fótatraðk***

This document was created with Win2PDF available at http://www.win2pdf.com.
The unregistered version of Win2PDF is for evaluation or non-commercial use only.
This page will not be added after purchasing Win2PDF.